# Fyrilestur við Lasse Boesen mánakvøldið 9. september kl 19.00

BANKNORDIK

Mánadag seinnapart luttaka hondbóltsleikararnir Lasse Boesen og Simon Jensen úr KIF Kolding København í gøtuhondbóltstiltaki fyri føroysk børn á Vaglinum í Havn.

Í hesum sambandi verður fyrilestur við fyrrverandi danska landsliðsleikaranum Lasse Boesen, ið fer at siga frá um gøtuhondbólt og hugsjónina handan spælið.

Fyrilesturin verður í Eysturskúlanum í Havn mánakvøldið 9. september kl. 19.00. Aftaná fyrilesturin verður møguleiki at royna seg í gøtuhondbólti í skúlagarðinum saman við Lasse og Simon.

## Um gøtuhondbólt

Meginhugsjónin handan gøtuhondbólt (Street Handball) er at eggja børnum og vaksnum til at íðka ítrótt uttan mun til førleikar og umstøður. Gøtuhondbóltur snýr seg um spæl, rørslu og um at stuttleika sær - tað snýr seg ikki um kapping ella um at vinna og tapa.

Við gøtuhondbólti verður hondbóltsspælið flutt úr høllini og út í skúlagarðin ella út í tún. Á tann hátt gerast ítróttur og rørsla ein natúrligur partur av gerandisdegnum á ein stuttligan og spælandi hátt.

Grundarlagið undir gøtuhondbólti er “tann góða upplivingin”, og tað er Lasse Boesen, ið eigur hugskotið til spælið. Í tøttum samstarvi við m.o. Ole Bruun Andersen, fyrrverandi úrvalsspælara og hondbóltsvenjara, arbeiðir Lasse Boesen við at breiða út kunnleikan til gøtuhondbólt.

## Um Street Handball Organisation

Lasse Boesen var við til at stovna felagsskapin Street Handball Organisation (SHO) í 2009 við tí fyri eyga at breiða út gøtuhondbólt í Danmark og Norðurlondum. Lasse og felagsskapurin SHO hava megnað at breitt kunnleikan um gøtuhondbólt út um norðurlendsk landamørk. M.a. hava teir staðið á odda fyri størri verkætlan fyri neystødd børn í Kenya.

BankNordik skipar fyri fyrilestrinum í tøttum samstarvi við Street Handball Organisation, Hondbóltssamband Føroya, KIF Kolding København og Neistan. Øll eru vælkomin til fyrlesturin, sama hvat ítróttarfelag og hvørja ítróttargrein ein hoyrir til.

Blíðar heilsanir
**BankNordik**